# ítróttur

Nr. 220 • mikudagur • 14. november 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Bæði fyri nýbyrjarar og meistarar



*Áhugin var stórur, tá PILA varð sýnt fyri almenninginum í SMS, og hópur av dystum fóru fram á Torginum*
*Mynd: Ingibjørg Jacobsen/SMS*

**Enn er kanska ov tíðliga at siga, hvørt PILA verður ein nýggj landaplága millum bæði ung og gomul, men í øllum førum er greitt, at føroyska fótbóltsspælið inniheldur tey trý týdningarmestu elementini fyri at gerast ein »sycces«. Høgt undirhaldsvirði, langa livitíð og so er tað eisini væl egnað til telduna**

SPÆLUM MÆLI
*Jákup Mørk*

Leygardagurin var dagurin, har nýggja føroyska fótbóltsspælið, PILA, fyrstu ferð var at fáa til keyps, og nógv vóru tey, sum høvdu leitað sær á Torgið í SMS, har stórsligið tiltak var stáplað upp á beinini.

Tað, sum kanska hevði størsta áhugan millum mongu børnini, sum vóru til staðar, vóru sjálvsagt Todi Jónsson og tveir av av liðfeløgum hansara, Diego Tur og Pascal Simpson, sum vóru hjástaddir, og autografarnir, sum vórðu skrivaðir vóru heilt nógvir í tali.

## Kappast ikki við telduna

Hóast hetta soleiðis var við til at økja um áhugan fyri tiltakinum, so skest heldur ikki burtur, at áhugin fyri PILA spælinum eisini var heilt stórur. At føroysk spøl verða givin út, er so avgjørt ikki á hvørjum degi, og spurningarnir til teir báðar uppfinnararnar, Magnus og Súna Egholm, vóru eisini heilt nógvir í tali.

Sjálvir ivast teir báðir ikki í, at spælið hevur eina lovandi framtíð, og tað skal eisini verða sagt beinanvegin, at spælið so avgjørt hevur sínar møguleikar.

Tá tosað verður um fótbóltsspøl í dag, so hugsa tey flestu kanska um teldutøka Champinship Manager ella FIFA-2002, men PILA eigur so als ikki at metast sum ein kappingarneyti til hesi, tó at talan her eisini er um spøl, sum hava við fótbólt at gera.

## Á alnetinum?

Heldur eigur PILA at síggjast sum ein kappingarneyti til tey sera væl umtóktu borðspølini sum eitt nú talv og backgammon, sum - hóast uppfinningin er elligomul – hava yvirlivað teldukollveltinga, sum er farin fram innan spælheimin seinnu árini. Ikki minst orsakað av teirri sannroynd, at spølini eru fram úr væl egnað til alnetið.

At rokna við, at PILA alt fyri eitt verður at finna á heimasíðuni hjá Yahoo-games, er kanska at taka dekan ov rívan til, men tað tykist sum um størsta fyritreytin fyri, at eitt borspæl skal standa seg í dagsins kapping er, at spælið eisini kann nýtast á teldu. Tað kann PILA, og fyri framtíðina hjá spælinum var tað tí eisini gleðiligt at frætta, at ein teldutøk útgáva av spælinum er ávegis.

## Fjølbroytnið er høvuðsæðrin

Ein fullkomin gjøgnumgongd av PILA verður helst ov tungt at gera á hesum síðum, men skal takast samanum, so kann ikki annað enn staðfestast, at fjølbroytnið í spælinum er so avgjørt størsti fyrimunurin.

Fyri at halda samanberingina við talv og backgammon við líka, so kann á ein hátt sigast, at PILA er ein blanding av hesum báðum. Her hevur tú einfaldar spælireglur, soleiðis sum tú hevur tað í backgammon. Torførasta av hesum er kanska reglan um rangstøðu, so kanska kundu dómaratríbólkar eisini havt sína vetrarvenjing við spælinum. Hinvegin eru standardstøðurnar so nógv færri í PILA í mun til backgammon. Ja, kanska eru møguleikarnir fleiri enn í talvi, og hetta ger, at tú ongan tíð kemur at spæla tvey spøl, sum eru eins.

Júst sum í talvi er tað av avgerandi týdningi, at fólkið verður flutt á skynsaman hátt, men í mun til talvið, ber ikki til at seta mótstøðuna heilt skák í mát. Hetta tí tilvildin eisini sleppur at ráða í ávísan mun. Terningar skulu jú nýtast, tá skot móti málinum og taklingar skulu avgreiðast, og tó at sannlíkindini fyri einum hepnum útfalli av hesum broytast – alt eftir støðuni á vøllinum – so kanst tú jú ongan tíð kenna teg heilt tryggan við terningunum.

Hetta fjølbroytni viðførir so eisini, at PILA í veruleikanum er eitt spæl fyri allar aldursbólkar. Dugir tú mannagongdina – og hon er einfaldari enn í talvi – so kanst tú spæla við, men hóast spælið soleiðis er sera lætt, so er tað kortini so sera torført, og júst hetta er kjarnin, sum tryggjar undirhaldsvirðið í spælinum.

## Útisetarnir vunnu

### Hesaferð vann Frederiksberg Volley 5-settara

FLOGBÓLTSTÍÐINDI
*fbf.fo*

Frederiksberg Volley og føroyingarnir Alvilda Ólavsdóttir og Annika Joensen vunnu sunnudagin 3-2 í einum sera spennadi dysti móti Rosenlund. Hetta var fyrstu ferð í ár, at Rosenlund var við undirlutan, og sigurin kom væl við hjá Frederiksberg, sum deilir 5. plássið vid Åbyhøj úr Århus. Næsta sunnudag skal Frederiksberg møta júst Åbyhøj, sum liðið tó hevur góðar vónir um at vinna á.

Í hesum fyrsta spæliumfarinum, har tey 10 liðini í elitudeildini spæla ein dyst ímóti hvørjum øðrum, ræður um at koma millum tey 6 fremstu liðini, sum eftir jól byrja av nýggjum og spæla endaspæl um finaluplássini. Hini 4 liðini, sum umframt Frederiksberg og Åbyhøj liggja til at koma vid í endaspælið eru: DHG Odense, Holte, Rosenlund og HIK Ålborg.

## Viborg nærri bjarging

Ein dystur varð leiktur í donsku SAS-liguni mánakvøldið.

Viborg og Vejle, sum bæði eru at finna miðskeiðis á stigatalvuni, spældu í Vejle, og har eydnaðist Viborg at vinna dystin 2-1.

Á stigatalvuni flutti hetta ikki nakað av liðunum, men Viborg fekk so skumpað niðurflytingarvandan trý stig longur burtur.

*-jm*




## Fólk søkist

Søkt verður eftir fólki til bókhaldið at byrja beinanvegin.

Viðkomandi má vera væl royndur innan bókhald og má kunna arbeiða sjálvsøtðugt.

Ringið ella skrivið til:

**Berg Motors**
Staravegur 1-3 100 Tórshavn
Tlf. 313 535

## Mekanikari

Søkt verður eftir mekanikara til lastvognsverkstaðið at byrja beinanvegin.

Viðkomandi má vera royndur innan hetta øki.

Ringið ella skrivið til:

**Berg Motors**
Staravegur 1-3 100 Tórshavn
Tlf. 313 535

Sosialurin -har tað hendir

## KUNNGERÐ

Boðað verður frá, at fólkatingsval er útskrivað. Ríkisumboðsmaðurin hevur ásett valdagin til at verða týsdagin 20. november 2001.

Atkvøðugreiðslan fer fram í bygdaráðshúsinum.

Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 09.00 fyrrapart og heldur fram til kl. 20.00 ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

Veljarar, sum eru burturstaddir valdagin, kunnu í seinasta lagi leygardagin 17. november 2001 greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna ella formannin i valnevndini fyri Sandavágs Kommunu, Gutta Petersen, tlf. 332376.

Valkort verða send út og skulu havast við tá atkvøtt verður.

**Sandavágs kommuna**




## Skattalistin ár 2000

Skattalistin ár 2000 fyri Sandavágs Kommunu liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í tíðarskeiðnum frá 14. november til 28. november 2001.

Kommunuskrivstovan hevur opið soleiðis:

| | |
|---|---|
| Mánadag: | frá kl. 15.00 til kl. 17.00 |
| Mikudag: | frá kl. 09.00 til kl. 12.00 |
| Hósdag: | frá kl. 15.00 til kl. 17.00 |

**Sandavágs Kommuna**

## BYGDARVEITSLAN

Miðvingar Úti & Heima
**verður leygarkvøldið 24. nov. kl. 19:30**

Skráin verður fjølbroytt sum undanfarin ár.
Kostnaður kr.200,- .
Seinasta freist at tekna seg er mikukvøldið 21. nov. kl. 21:00 á
tlf. 332921 ella 332645

Aldursmark 18 ár



Hjartaliga vælkomin
**Gleimur**

## Peter Belli & Østjydsk Musikforsyning

Fríggjakvøldið 23. november kl. 22.00
Kostnaður kr. 125,-.
- atgongumerki fáast til keyps á Kunningarstovuni & 3'arinum



Hotel Föroyar bjóðar í hesum sambandi:
STÓRT KALT BORÐ
frá kl. 20.00
Kostnaður kr. 175,-

*Borðbílegging á tlf. 317500*

Hotel Föroyar Best Western

Sosialurin - 311820

## MASKINMEISTARAÚTBÚGVING

***tín møguleiki - títt val***

**Byrjað verður 4. januar 2002**



Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta hægri yrkisútbúgving sum fáast kann yvirhøvur í Føroyum, og tí gevur sera stórar møguleikar bæði á sjógvi og landi, umframt eisini oljuvinnuni, har maskinmeistarar t.d. er størsti yrkisbólkur.

Útbúgvingin tekur 3 ár, men tað er eisini møguligt at gevast eftir próvtøku fyrsta árið, og gevur hesin eitt ára lesnaður ávís rættindi sum maskinistur.

Hevur tú hug at gerast maskinmeistari, so skalt tú seta teg í samband við skúlan, so senda vit tær upplýsingar um upptøkutreytir og lesnaðin saman við umsóknarblaðnum. **Síðsta freist at søkja er 14. desember 2001**

**MASKINMEISTARASKÚLIN**
Undir krákugjógv 5, FO-100 Tórshavn,
tlf. 312661, fax 318545
E-mail: mms@mec.fo • Heimasíða: www.mec.fo